***Álit við tilmæli um samsýning og eftirløn løgtingsmanna juni 2018***

Páll á Reynatúgvu, løgtingsformaður
Føroya Løgting
Tinghúsvegur 1
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 8. juni 2018

Í skrivi, dagfest 14. november 2017, heitti løgtingsformaðurin á undirritaðu at manna nevnd at endurskoða løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.

Endamálið við arbeiðnum var at tryggja formansskapinum í Løgtinginum eitt dygt og væl grundað tilmæli um samsýningar og eftirløn løgtingsmanna. Arbeiðsbólkurin skuldi taka atlit at:

- Lønarlagnum í landinum yvirhøvur
- Teirri tign og ábyrgd, sum liggur í tingsessinum
- Hhvussu tingmenn í grannalondum okkara verða løntir
- Øðrum viðkomandi viðurskiftum.

Arbeiðsbólkurin hevur arbeitt á tann hátt, at á fyrstu fundunum varð avgjørt, hvussu leisturin á álitinum skuldi verða og avtalað varð, hvør skuldi kanna hvat. So hvørt tær ymisku upplýsingarnar eru fingnar til vega, og tey ymisku brotini í álitinum hava verið skrivað, hava vit hittst og gjøgnumgingið tilfarið við tí fyri eyga at gera eina orðing, sum øll kundu semjast um. Til seinast eru tey ymisku tilmælini síðani sett saman.

Álitið er hjálagt hesum skrivi. Tilmælini, sum vit eru komin fram til í arbeiði okkara við álitinum, eru sett upp niðanfyri. Mælt verður til at hesi verða sett í gildi sum ein heild, galdandi fyri tinglimir, sum verða valdir á ting eftir næsta val.

- Lønartalvan hjá tænastumonnum landsins skal framvegis vera grundarlagið undir lønarsamsýningini.
- Lønarsamsýningin hjá løgtingslimum verður hækkað úr 34. lønarflokki (kr. 38.585 um mánaðin) til 36. lønarflokk (kr. 44.147 um mánaðin) hjá tænastumonnum landsins.

***Álit við tilmæli um samsýning og eftirløn løgtingsmanna juni 2018***

- Skattafría kostnaðarískoytið (kr. 2.000 um mánaðin) verður strikað.
- Tinglimir fáa, í staðin fyri at fáa útflýggjað ein teldil, útflýggjað eina hóskandi farteldu til løgtingsarbeiðið og fáa goldið telefonnýtslu sína, meðan teir hava sæti á tingi.
- Fráfaringarsamsýningartíðarskeiðið verður broytt frá at verða í minsta lagi 4 mðr. og í mesta lagi 6 mðr. til at verða í minsta lagi 3 mðr og í mesta lagi 6 mðr.
- Tað verður farið frá einari skipan við ongari mótrokning í fráfaringarsamsýningini til, at mótroknað verður í fráfaringarsamsýningini í teimum førum, har tinglimur hevur aðra lønarinntøku í fráfaringartíðarskeiðinum, soleiðis at tað almenna tá bert skal gjalda møguliga munin upp til ásettu fráfaringarsamsýningina.
- Verandi pensjónsskipan verður broytt, soleiðis at farið verður frá verandi skipan við tænastumannapensjón til eina skipan, har landið rindar 15% av lønarsamsýningini hjá tinglimum í eina góðkenda pensjónsskipan. Í hesum sambandi verður sama skiftisskipan nýtt, sum verður nýtt fyri landsstýrisfólkini í sambandi við, at tey eru farin frá at vinna sær tænastumannapensjón til, at landið rindar 15% av lønarsamsýning teirra í eina góðkenda pensjónsskipan.
- Lønarsamsýningar og fráfaringarsamsýningar fara frá at verða goldnar forút til at verða goldnar afturút frá næsta løgtingsvali.
- Allir varalimir, sum hava havt sæti á løgtingi í meira enn tríggjar mánaðar samanlagt í einum valskeiði, og framvegis sita á tingið ein mánað, áðrenn val verður útskrivað, fáa fráfaringarsamsýning í mun til tíðarskeiðið, viðkomandi hevur havt sæti á løgtingi. Varalimir fáa fráfaringarløn í 1 dag fyri hvørjar 16 dagar, viðkomandi hevur tikið sæti á tingi, tó í mesta lagi í 6 mánaðir.
- Treytirnar viðvíkjandi fráfaringarsamsýningini hjá løgtingsformanninum verða tær somu sum tær viðvíkjandi fráfaringarsamsýningini hjá løgmanni.
- Lógin um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. verður broytt soleiðis, at løgtingsformaðurin í øllum lutum er javnsettur við løgmann og ikki bara í mun til samsýning.
- Lógin frá 2003 um nevnd at geva løgmanni tilmæli um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. verður víðkað til eisini at umfata at geva løgtingsformanninum tilmæli um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.

Við heilsan

Jógvan Amonsson　　Maria á Dul　　Gunn Ellefsen